

# Lærlingur og Biltøkningur

## P/F Wenzel søkir eftir lærlingi og biltøkningi til mekaniska verkstaðin.

P/F Wenzel leggur stóran dent á kundanøgdsemi, og tí ynskja vit nærlagni og álit frá umsøkjarunum. Vit seta stór krøv til starvsfólki, men kunnu eisini veita eitt gott og varandi arbeiði undir skipaðum viðurskiftum í góðum arbeiðsumhvørvi, har tað er umráðandi, at starvsfólki trívist.

Møguligar umsóknir skulu verða okkum í hendi innan **04. aug. 2006.**

Um tú ynskir eina framtíð saman við okkum, er tú vælkomin at senda eina skrivliga umsókn til

**P/F Wenzel**
**Postboks 3043**
**110 Tórshavn**

www.wenzel.fo



**P/F WENZEL**
Akranesgøta 5
Tórshavn
Tel 354500



# KOKKAR TIL NORRÖNU

## Søkt verður eftir kokkum til Norrönu at byrja skjótast gjørligt

Smyril Line bjóðar áhugaverd og avbjóðandi starvsum kokkur í einum altjóða umhvørvi har lyklaorðini eru:

- Ábyrgd
- Personlig avbjóðing
- Dygd
- Faklig menning
- Persónlig menning

Smyril Line sóknast eftir fólki við royndum á høgum, altjóða tænastustigi. Tað er krav, at umsøkjararnir duga væl enskt, hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið.

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst (ikki eldri enn 2 ár).**

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið (ikki eldri enn 5 ár).

Løn og setarnartreytir eru smb. galdandi sáttmála undir FAS-skipanini við Føroya Fiskimannafelag

Størvini verða sett skjótast gjørligt.

Umsóknir og CV skulu sendast við telduposti til aðra av hesum tilskriftum:

crew@smyril-line.fo
hotel.manager@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og í dag selja og marknaðarføra vit Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark um allan heimin.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík, Kiel og í Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveits, Benelux, Fraklandi og Italia.

SMYRIL LINE · EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM

www.ns.fo

*Vit søkja*

# fleiri starvsfólk, ið veruliga flyta mørk, til Vinnudeildina

*Sum vinnukundaráðgevi gerst tú ein týðandi partur av einum nýggjum og øðrvísi peningastovnskonsepti, har stórur dentur er lagdur á, at kundar okkara fáa eina góða, jaliga og professionella uppliving, hvørja ferð vitjað verður í sparikassanum. Ljóðar hetta áhugavert og spennandi? Og hevur tú kunnleika, arbeiðsroyndir ella hóskandi útbúgving á økinum, ert tú kanska júst ein av okkara nýggju vinnukundaráðgevum. Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum peningastovni í støðugari menning, við flatari skipan og óbundnari samskipan, har tú í stóran mun hevur møguleika fyri at seta dám á tín arbeiðsdag. Har tú kemur at arbeiða saman við dugnaligum,virkisfýsnum og málrættaðum starvsfeløgum, ið dagliga flyta mørk, og soleiðis eru við til at skapa framburð.*

***Løn og setanarviðurskiftir***
*Eftir nærri avtalu, samsvarandi útbúgving og royndum umsøkjarans.*

***Umsókn***
*Umsókn saman við CV og prógvum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. august 2006 og skal sendast til: Norðoya Sparikassa, Starvsfólkadeildin, postboks 149, FO-700 Klaksvík, Føroyar.*

***Spurningar***
*Hevur tú eitthvørt at spyrja um viðvíkjandi starvinum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við:*
*Eyðun Kjølbro, undirstjóra, tel. 475055 , t-postur: eydunk@ns.fo*
*ella Marner Mortensen, varastjóra, tel 475070 , t-postur: marner@ns.fo*



*Spyr bara – vit leiðbeina fegin!*

*Gerandisdagurin, og í heila tikið tíðin vit liva í, er merkt av støðugt stórum broytingum. Og hetta er eisini galdandi fyri fíggjarheimin. Fyri Norðoya Sparikassi er 2006 eitt serliga spennandi ár við nýggjum deildum í Saltangará og Tórshavn – og nógv tíð og orka er løgd í at menna eitt nýtt konsept, har tað at støkka inn á gólvið í Norðoya Sparikassa, gerst ein góð uppliving við høgum tænastustøði og góðari ráðgeving. Og ein hin mest týðandi táttur í einhvørjum slógbrótandi virksemi eru starvsfólkini! Er hetta nakað fyri teg, ert tú jaligur av lyndi, hevur góð samstarvsevni, humor, lætt við at tosa og samskifta við fólk, gott sjálvsálit, eins og tær dámar at arbeiða sjálvstøðugt og við støðugt nýggjum avbjóðingum, er Norðoya Sparikassi kanska júst arbeiðsplássið fyri teg...*

Norðoya Sparikassi Ósavegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík
Tel. 475000 Fax 476000 ns@ns.fo